## DAGSINS MEINING

# ST má uppí

Støðan í Miðeystri gerst støðugt vandamiklari, og hon gevur terroristafelagsskapum gróðrarbotn sum ongantíð fyrr. Uttan mun til hvat hendir og ikki í Irak, so er tað í veruleikanum hendingarnar í Ísrael og teimum palestinsku økjunum har, sum hótta heimsfriðin og sum kunnu elva til uppaftur størri terrorvirksemi í Vesturheiminum.

Herfyri fýltust fyrrverandi diplomatar í Bretlandi at rikna politikkinum hjá Blair ella rættari, tørvandi politikkin í málinum um palesteinar og ísraelar. Teir mettu, at Blair er alt ov eftirgevandi fyri Bush og hansara nærum apatiska politikki, tá tað viðvíkur viðurskiftunum í Ísrael og Palestina.

Nú frætta vit so, at ísraelar pulverisra hundraðtals hús og heim hjá palestinum í Gaza, og at fleiri túsund ósek menniskju eru uttan tak yvir høvdið. Ísraelar vilja hesum gera av við militantar palestinar og forða teimum at fáa vápn úr Egyptlandi. Spurningurin er so bara, hvat við teimum óseku. Mannarættingafólk kalla ísraelsku gerðinar fyri fólkamorð og grundleggjandi brot á mannarættindini.

Nú um dagarnar hoydu vit ein av leiðandi og hóvligu leiðarunum fyri arabisku ligaina siga, at líka mikið hvat hendir í Irak, so er tað væntandi amerikanski áhugin og líkasælan at fáa frið millum ísraelar og palestinar, sum er størsta hóttanin í dag.

Hetta er júst sama grundgevingin vit hava hoyrt leiðandi Alqeitalimir geva, tá tosað verður um, hví teir fremja sínar atsóknir. Soleingi USA og Vesturheimurin lata vera við at leggja trýst á ísraelsku stjórnina at loysa kreppuna har, fara atsóknir móti hesum londum at halda fram. Bíðað verður bara eftir, hvat næsta stóra atgerðin fer at bera í sær. Ein kann rokna við tí ringasta, nú EM í fótbólti verður ella OL í Grikkalandi.

Tí má ST uppí og spæla ein størri leiklut bæði í Ísrael og í Irak.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrstu 100 dagarnir í Sosialinum

**Helgi Abrahamsen**



Hósdagin 13. mai høvdu tveir blaðmenn á Sosialinum roknað seg fram til, at 100 dagar vóru farnir síðani ABC-samgonga var skipað, og í tí sambandi varð gjørt upp, hvat samgongan hevði fingið burturúr.

Tað at fjølmiðlar fylgja við, hvat ein samgonga fær av skafti, haldi eg vera í fínasta lagi, men samstundis vil eg eisini siga, at tað er umráðandi, at viðgerðin er saklig, og best hevði verið um allir flokkar og allar samgongur vórðu viðgjørd nøkunlunda eins.

Tíverri má eg siga, at umrøðan sum landsstýrið fekk í Sosialinum 13. mai var ikki saklig, og póstandirnir vóru illa grundaðir.

**Ein samanbering**
Um vit samanbera teir fyrstu hundrað dagarnar hjá sitandi samgongu, við fyrstu hundrað dagarnar hjá undanfarnu samgongu (sum hvørki Sosialurin ella nakar annar fjølmiðil gjørdi nakað burturúr), so sær samanberingin soleiðis út:

Løgtingsval var 30. apríl 2002. Samgonguskjalið varð undirskrivað 6. juni, og hevði táverandi samgongusamstarv sostatt vart í 100 dagar tann 14. september 2002. Innan henda dagin vóru tvey nýggj aðalstýri sett á stovn, ein nýggjur aðalstjóri var settur í starv og ein annar var á veg.

**Bert tvey uppskot**
Frá 6. juni til 14. september 2002 legði táverandi landsstýri einans tvey lógaruppskot fyri tingið. Annað var ein eykajáttanarlóg og hitt var uppskot um áseting av fiskidøgum. Tað vil siga, at í báðum førðum var talan um uppskot, sum landsstýrið sambært lóg var tvingað at leggja fyri tingið.

Restin av landsstýrinum (seks landsstýrisfólk og løgmaður), vóru framvegis ikki komin í tingið við so mikið sum einum uppskoti, tá 100 dagar vóru farnir. Kortini høvdu fimm stórar ósemjur verið í samgonguni, sum beinleiðis høvdu hótt samgongusamstarvið, men ikki eitt kritiskt orð var at síggja í Sosialinum um alt hetta tann 14. september 2002.

Men 13. mai 2004 finnst Sosialurin at sitandi landsstýri, tí nú verður ikki nóg nógv gjørt, fyri at spara aðalráð og stjórar burtur aftur, sum undanfarna landsstýri kom við. Men tað løgnasta av øllum er, at funnist verður eisini at samgonguni, fyri at hava sett bara ein landsstýrismann at umsita almanna- og heilsumál. Hetta halda blaðmenninir vera ov lítið, og ein má spyrja seg sjálvan, hvat blaðmenninir vilja ? Ætla teir at økja talið av landsstýrismonnum, samtíðis sum talið av aðalráðum skal minka ?

**Nýggja landsstýrið**
Sitandi landsstýri hevur 100 teir fyrstu dagarnar lagt 21 uppskot fyri tingið (17 lógaruppskot, 3 uppskot til samtyktar og 1 uppskot til ríkislógartilmæli) (hetta er meira enn tíggju ferðir so nógv, sum undanfarna landsstýri hevði lagt fram, tá tað hevði sitið í 100 dagar). Talið av landsstýrismonnum og aðalráðum er minkað við tveimum, meðan tað hjá undanfarna landsstýri var økt við sama tali.

Hetta er hóast alt ikki so gali.

**Viðgerð av landsstýrisfólkum**
Sosialurin viðgerð ikki bara samgonguna undir einum, men einstøku landsstýrismenninir og løgmaður verða eisini viðgjørdir persónliga. Tað verður ov drúgt at gjøgnumganga alt her, so eg velji at taka eitt dømi burturúr rúgvuni.

Um Bjørn Kalsø verður sagt, at LEYSATÍÐINDI vilja vera við, at hann framvegis sópar undan neytum og undirvístir børnum á Syðradali, tí maðurin er ikki at finna í pressuni. Høvdu blaðmenninir gjørt sær ómak at tosað við landsstýrismannin áðrenn teir skrivaðu hesar reglurnar, so kundi hann kanska greitt teimum frá, at hann, áðrenn hann gjørdist landsstýrismaður, var seyðabóndi (tað vil siga, tað slagið av bónda, sum ikki sópar undan neytum), og at hann eisini var lærari í Klaksvík (og ikki á Syðradali).

Eg skilji væl, at bløðini sum komu út um næstseinasta aldamót onkuntíð vóru noytt at brúka vendingar sum "graml er um…", ella "menn vilja vera við…", tí við tátíðar samskiftismøguleikum var ikki lætt at fáa tíðindini váttaði. Men at eitt tíðindablað í 2004 skal fáa seg til at skriva at "leysatíðindi vilja vera við…", bara tí at blaðmenninir ikki tíma at kanna eftir, um tíðindini eru sonn ella ikki, er undir alt lágmark. Eg skilji heldur ikki hví Bjørn Kalsø verður lastaður fyri, at hann ikki er so ofta at síggja í pressuni, tí mær vitandi eru tað tíðindafólkini einsamøll sum avgera, hvør sleppur í pressuna.

**Óheft tíðindablað ?**
Onkur sigur at Sosialurin er óheft tíðindablað meðan onkur annar sigur at hann er málgagn hjá Javnaðarflokkinum. Hvat av hesum er rætt, skal eg ikki taka dagar ímillum, men hósdagin 13. mai má eg viðganga, at Sosialurin var hvørki javnaðarblað ella óheftur.

# Cassiopeia lýsir føroyska mentan

**John S. Myllhamar**



Havi gjøgnum nógv ár roynt at fingið onkran at lýsa hugtakið: mentan, men havi ikki fingið tað inn í høvdið.

Nú kom so mentanardeildin í SvF einum til hjálpar við familjusendingin Cassiopeia, ið send verður klokkan átta sunnukvøld, tá foreldur, børn, ommur og abbar sita saman framman fyri skíggjanum. Naivu offrini, sum drigin vóru inn í sjónvarpstovuna, skuldu lýsa hugtakið kultur. Niðurstøðan var, at føroysk mentan er: Kynsvilla, mótaklæðir, grøðing, sex, spákonur, neytalundir og undirbuksur.

Ríkur kulturur, má sigast.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Ferðaráðið komið við nýggjum faldara

**At ferðast í Føroyum, er eitt stórt átak, sum ferðaráðið nú er farið undir. Nýggjasti faldarin er júst útkomin, og hann er um at súkkla í Føroyum**

*Eydna skaale*
*eydna@sosialurin*

Herfyri fingu Føroyar triðju virðislønina sum besta ferðamál. Grundgevingin fyri hesum heiðuri, var gongufaldarin, sum vísir á og greiðir frá 14 gongutúrum í haganum ymsastaðni í landinum. Væl verður greitt frá hvørjum einstøkum túri, bæði hvussu tungt er at ganga, uml hvussu langa tíð túrurin tekur og hvat útsýni er á túrinum. Fremst í faldaranum verða góð ráð givin um hvussu tú skalt bera teg at úti í náttúruni. Ein mynd er frá hvørjum túri. Eisini er lítil mynd av kortinum yvir økið har gingið verður. Á kortinum er merkt akkurát hvar túrurin gongur. Talmerkt er, har okkurt serstakt er á leiðini, t.d. um tú skalt vera serliga ansin ella minnast til at sneiða inn á eina aðra gøtu.




*Fjúrtan túrar eru í faldaranum og teir eru væl merktir á kortinum*

Túrarnir eru býttir upp í fýra torleikastig, alt eftir hvussu langar og brattar brekkur eru á vegnum. Kunningin um túrarnar er eisini í hesum faldaranum sera góð og myndirnar eru avbera vakrar.

So tað er bara at herja á, út at njóta landið samstundis sum tú fært rørt tær kroppin eitt sindur.

**Súkkla**
Og nú er so eisini næsti faldarin komin. Hann er bygdur á sama hátt sum tann fyrri, men hesin snýr seg um súkklutúrar í Føroyum.



*Góð ráð verða eisini givin, hvussu tú bert teg at í náttúruni*

# Hvannasunds Kommuna fingið búmerki

**Livar Nysted úr Hvannasundi vann búmerkjakappingina hjá Hvannasunds kommunu**

BÚMERKJAKAPPING

Hvannasunds Kommuna samtykti fyri nøkrum mánaðum síðani, at Kommunan skuldi hava eitt búmerki.

– Endamálið við búmerkinum er, at vit vilja gera Hvannasunds Kommunu sjónligari, vit vilja profilera kommununa, so tað lættliga skal síggjast, hvør kommuna talan er um, vit vilja vísa, at vit eru stolt av okkaru kommunu, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri í Hvannasundi.

Inn komu 121 búmerkir frá 18 luttakarum.

Í lýsingini til búmerkjakappingina stóð millum annað, at búmerki kundi hava eina ávísa staðarlýsing, Hvannasunds Kommuna kundi vera ein partur av búmerkinum, búmerkið skuldi kunna kennast í bæði stórari og lítlari útgávu og at tað skuldi kunna nýtast ígjøgnum fax. So tað stóð hvørjum einstøkum luttakara ógvuliga frítt, at koma við uppskotum til búmerki.

– Niðast í lýsingini kunnaðu vit í stuttum um kommununa, soleiðis at øll høvdu somu fortreytir fyri at koma við uppskoti til eitt búmerki, sigur Júst Poulsen.

Til at vegleiða bygdarráðnum vað sett ein trímanna nevnd við fólkum við ymiskum fortreytum.

– Hendan nevdin er komin við einum tilmæli til bygdarráðið um júst hettar merkið. Myndaevnið á búmerkinum er norður gjøgnum Sundið. Har sæst Sundalandið og Oyralandið og byrgingin, sum knýtur saman bygdirnar. Byrgingin er teknað sum ein bátur og ímyndar fiskivinnuna sum vit liva av, sigur Júst Poulsen.



*Júst Poulsen handa Livari Nysted kekkin upp á 8.000 kr fyri at hava teknað búmerkið til kommununa*



*Myndaevnið er norður gjøgnum Sundið. Vit síggja Sundalandið, Oyralandið og byrgingina, sum knýtur saman bygdirnar. Byrgingin er teknað sum ein bátur og ímynhdar fiskivinnuna, sum fólkið livir av*

# Ung sýna gávurnar á stjørnubreyt

**Sangur og dansur. Rockur og klassiskt. Kór og poppur. Vikuskiftið bjóðar eitt sindur til øll, tá ið føroyskur ungdómur aftur prógvar, hvussu gávuríkur hann er**

STJØRNUBREYT
*Tíðindaskriv*

Leygardagin og sunnudagin fara evnarík ungfólk at vísa síni kynstur á palli í Norðurlandahúsinum. Talan er um ung stjørnuskot, ið royna seg sum solistar og í bólki. Millum tey kendastu eru Jóannes Lamhauge, ið fekk gjøgnumbrot sum Jósef í sangleikinum um litfagra dreymakotið, og Brandur Enni, ið longu hevur verið heimskendur í Føroyum leingi. Men tað vera so nógv onnur á palli í fyrstu stjørnubreytini, sum Tórshavnar Musikkskúli, Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, Føroya Musikkskúli og Norðurlandahúsið í felag skipa fyri. Talan er um eitt fjøltáttað tiltak har høvi verður síggja og hoyra solosang, kór, rock, popp, klassiskt og dans.Stjørnubreytin 2004 er eitt spildurnýtt tiltak, sum verður roynt fyri fyrstu ferð, men ætlanin er, at hetta verður eitt afturvendandi høvi hjá evnaríkum ungum at royna seg á palli.Á skránni hesaferð eru: Kamilla Ravnsfjall, Konni Kass Jacobsen, Heini Gilstone Andersen, Benjamin Petersen, Mia Káradóttir, Heiðrun Petersen, Blásarakvintettin, Dávur Juul Magnussen, Break Dance og Paradox. Húsorkestrið er Pauli Poulsen, Bjarni Lisberg, Bárður Poulsen og Búgvi Jónleifsson.Stjørnubreytin 2004 verður leygarkvøldið 22. mai kl. 19.30 og sunnudagin 23. mai kl. 16. Tey, ið skipa fyri vegna stovnarnar, eru Sigrið Sivertsen, Jónleif Jensen og Steintór Rasmussen.